

# REGLUGERÐ FYRI FLOGFENAÐHALD Í VESTMANNA KOMMUNU

Við heimild í § 26 og §32 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, við seinni broytingum, verður hendan reglugerð sett í gildi.

## ØKI OG LÝSINGAR

§ 1. Reglugerðin fevnir um uttandura húsdjórahald av flogfenaði í Vestmanna Kommunu.

Stk. 2. Reglugerðin fevnir tó ikki um vinnuligt virksemi, ið krevur umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktobur 1988 um umhvørvisvernd.

Stk. 3. Flogfenaður umfatar høsn, kalkunir, perluhøsn, dunnur, gæs o.s.v., ið verða hildin úti sum heimafuglur við tí fyri eyga, at ala víðari (egg til klekingar) ella til framleiðslu av kjøti ella etingareggum (eisini til egið brúk).

## KRØV TIL FLOGFENAÐHALD

§ 2. Í øllum bygdum økjum í kommununi skulu tey, ið fara undir at halda flogfenað, gera tað í samsvar við hesa reglugerð.

Stk. 2. Tey, ið ætla at halda flogfenað, eiga at boða næstu grannum sínum frá, og skulu spyrja seg fyri hjá kommununi, um ivamál eru.

Stk. 3. Flogfenaðhald, ið longu er skipað, áðrenn reglugerðin kemur í gildi, kann halda fram, sum er, men kann tó koma undir reglurnar í §§ 3-5, harundir kunnu krøv ella forboð verða sett teimum.

## KRØV TIL BÚR, GARÐAR, GIRÐINGAR, HÚS OG TÍLÍKT

§ 3. Búr, hús ella tílíkt bygningskent tilhald hjá flogfenaði skal vera í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna.

Stk. 2. Girðing skal antin vera púra tøtt ella vera í minsta lagi 0,5 m frá marki hjá granna, tá talan er um hegn, rimagarð ella tílíkt.

Stk. 3. Girðingin skal gerast forsvarliga, eisini so, at annar fuglur ikki fær flogið inn, og um neyðugt, skal net spennast yvir.

Stk. 4. Búr og hús skulu lyftast 0,35 m upp frá jørðildinum fyri at tryggja móti rottu. Tó ikki gásarhús, ið kunnu vera grivin niður í svørðin.

Stk. 5. Ikki er loyvt at hava flogfenað gangandi leysan á gøtu, vegi ella øðrum øki, sum er opið fyri vanligari ferðslu ella aðrari atgongd hjá fólki.

Stk. 6. Hanar mugu ikki vera uttandura millum kl. 21 á kvøldi og kl. 7 á morgni.

## FÓÐUR OG TÍLÍKT

§ 4. Fóður skal goymast í rottutryggum íløtum.

Stk. 2. Gevast má ongantíð meiri enn tað, sum verður etið eftir í mesta lagi einum tíma. Avlop skal takast burtur í seinasta lagi ein tíma, áðrenn sólin fer niður, tó í seinasta lagi kl. 20:00 á kvøldi.

Stk. 3. Búr, hús o.t. skulu regluliga sópast og haldast rein. Girðingar skulu haldast í góðum standi.

Stk. 4. Tøð (skarn) frá húsdjórahaldinum skal antin brúkast sum tøð á egnum stykki ella latast til IRF.

## KLAGUR, BOÐ, TREYTIR OG FORBOÐ

§ 5. Um hald av flogfenaði elvir til ampa sum lukt, gang, nógva flugu, rottu ella annað, kann Vestmanna Kommuna geva eigaranum boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag. Verða boðini ikki fylgd, kann kommunan seta forboð fyri haldinum.

## UNDANTAKSLOYVI

§ 6. Í serligum førum, serliga eftir samtykt frá grannum, kann Vestmanna kommuna eftir áheitan, geva smærri frávik frá ásetingum í §§ 2-4.

## KÆRUMÁL

§ 7. Avgerðir hjá Vestmanna kommunu eftir hesi reglugerð kunnu innan 4 vikur, kærast til Umhvørvisstovuna. Fellur kærufreistin á ein leygardag ella sunnudag, verður hon longd til næsta gerandisdag. Kæra skal sendast til kommununa, sum sendur hana til Umhvørvisstovuna við viðkomandi tilfari í málinum.

Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni í kærumálum kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

## GILDISREGLUR

§ 8. Henda reglugerð, sum er samtykt á býgdarráðsfundi tann 23. novembur 2023 og er góðkend av Umhvørvisstovuni tann. 6. desembur 2023, kemur í gildi tann 1. januar 2024.

Bakkavegur 8 – 350 Vestmanna
Tel 770 100 – vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

VESTMANNA KOMMUNA